# SJÓVINNUSTÝRIÐ

## Løgfrøðingur til Sjóvinnustýrið

### *Sjóvinnustýrið søkir eftir einum løgfrøðingi til setan skjótast gjørligt.*

*Sjóvinnustýrið er stovnur undir Vinnumálaráðnum við deildum í Miðvági(Skipaeftirlitið) og í Tórshavn(Føroya Skipaskráseting og Føroya Altjóða Skipaskráseting).*
*Arbeiðsøkið hjá stovninum er fyrisiting og eftirlit við heilsu, umhvørvi og trygd á føroyskum skipum, skráseting av skipum og at marknaðarføra Føroya Altjóða Skipaskráseting.*
*Uppgávur Sjóvinnustýrisins fevna um samskifti og samstarv við vinnulívið í Føroyum og úti í heimi, við útlendskar fyrisitingar og altjóða og millumtjóða felagsskapir t.d. International Maritime Organisation, International Labour Organisation, Organisation for Economic Coordination and Development, United Nations Conference on Trade and Development og aðrir.*
*Samstarvspartar stovnsins eru sostatt fyrst og fremst alt tað maritima umhvørvið í Føroyum, men eisini í størri og minni mun maritimar fyritøkur, bólkar og felagsskapir kring allan heimin.*

Løgfrøðingurin skal saman við øðrum løgfrøðingi starvast í stovnsins løgfrøðiliga toymi, sum er skipað sum eina stápsfunktion og hevur til uppgávu at veita øllum starvsfólkum løgfrøðisligan stuðul innan teirra fakøki, og annars vera leiðsluni til hjálpar við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Luttøka í lógar- og reglusmíð serliga á manningar- og skrásetingarøkinum og at veita løgfrøðisligan stuðul til fakeindirnar á hesum báðum økjum
- Fyrisiting og eftirlit við føroyska regluverkinum innan sjóvinnu soleiðis, at tað er í samsvari við altjóða lóggávu
- Samskifti við vinnuna
- Samskifti við altjóða felagsskapir, ið fáast við sjóvinnu
- Ráðgeving til starvsfólk og leiðslu í fyrisitingarligum spurningum
- Undirvísing av starvsfeløgum
- Back-up á arbeiðsøkinum hjá hinum løgfrøðinginum

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum løgfrøðingur
- Góð evni at samskifti á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni

Ì starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan arbeiðsøkið.
Um tú hevur hug at gerast partur av einum stovni í menning, sum bjóðar fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, so er tú vælkomin at søkja hetta starvið.
Umsókn saman við próvtøkuprógv, lívsrensl og møguligar referansur verður at senda til Sjóvinnustýrið, Sigmundargøta 13, postboks 1178, 110 Tórshavn.
Freistin at søkja er fríggjadagin 27. august 2010 kl. 9 á morgni.
**Umsóknin skal verða merkt "løgfrøðingur".**
Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tommy Petersen, stjóra á tel. 351500.

*Sjóvinnustýrið hin 2. august 2010*

# SANDOYAR Barnaverndartænasta

**Søkt verður eftir 2 stuðlum til familju í Sandoynni at byrja skjótast til ber.**
Stuðulsstørvini eru ávikavist 20 og 10 tímar um vikuna.

Stuðulsstørvini eru tíðaravmarkaði til **31. desembur 2010,** men kunnu møguliga verða longd.

Stuðulsstarvið á 20 tímar er í dagtímunum, og arbeiðsstaðið er heima hjá familjuni og í barnagarði.
Stuðulsstarvið á 10 tímar er seint seinnapart og kvøldabeiði, og arbeiðsstaðið er heima hjá familjuni.
Endamálið við stuðlinum er at stuðla familjuni bæði heima og á dagstovni.

Ynskiligt er, at tey, ið sett verða, hava viðkomandi útbúgving og / ella royndir.
Viðkomandi skal hava góð samstarvsevnir, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Setanin er sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar** fáast við at venda sær til Sandoyar Barnaverndartænastu á tlf. 288024 millum kl. 8.00 og 12.00.

**Skrivlig umsókn** við hjáløgdum próvskjølum og viðmælum skal sendast til Sandoyar Barnaverndartænastu í seinasta lagi 20. august.

**Sandoyar Barnaverndartænasta**
Skúlavegur 3
230 Húsavík

Sandoyar Barnaverndartænasta er eitt samstarv um umsiting av barnaverndarøkinum millum Skopunar- Sands- Skálavíkar- Húsavíkar og Skúvoyar kommunur. Í økinum búgva í løtuni 1.440 fólk og av hesum eru 346 børn og ung.


# Summarfrí

**Vegna summarfrí er avgreiðsla okkara stongd frá mánadegi 19. juli til og við fríggjadag 13. august 2010.**

Samband fæst við okkum á telefon 591600 og 591602 ella á telduposti gs@gs.fo

GRANNSKOÐARASTOVAN
Heiðalon Heiðavegur 31 600 Saltangará

# SANDUR-SKERVUR-GRÓT

- **Hvítur skervur til tún**
- **Norskur stoypisandur**
- **Skeljasandur til mold**
- **Tilfar til planering**
  0-32mm,8-16mm,16-32mm, 32-64mm, 32-120mm

SANDGREVSTUR
Fuglafjørður
Telefon 445000 / 595900
STOVNAD 1949

# Astrologi skeið

Astrologi skeið verður tann 16.-17. oktober.

Tilmelding áðrenn 17. september.

*olsen1208@gmail.com*

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er: mánadag-hósdag frá kl. 9-16 fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur 620 Runavík Tlf. 448480

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ





Ring og hoyr nærri

miðlahúsið í Vágsbotni

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

FØROYABANKI stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801 POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO Sosialurin

# STILLADS LEIGA

Absolutt bíligast!





GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60

www.fjorukrogvin.fo

- *Matstova*
- *Søgusavn*
- *Gávubúð*

FJØRUKRÓGVIN Restaurant ~ Bar
*Tel. 471500 / 771500*

# Sosialin
-so eru tit við!

www.sosialurin.fo